

*Frálíka samspælið millum sjónleik og tónleik skapar heilt nýggjar heimar í familjuleikinum Í Geyma. Her eru tað Hans Torgarð og Brølapan, sum folda seg út*

# Leikararnir bjarga Í Geyma

**Í løtum røkkur orðaspælið út um pallkantin, men í síðsta enda eru tað frálíku sjónleikararnir og tónleikurin, sum bjarga familjuleikinum Í Geyma**

UMMÆLI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í eina viku nú hevur familjuleikurin Í Geyma gingið fyri fullum húsum í nýggju Athøllini í Norðurlandahúsinum. Stóri áhugin hongur uttan iva lutvíst saman við, at barnabókin Í Geyma eftir Dánjal Hoydal er sera væl umtókt millum børnini. Og eg giti, at fyri børnini er tað bæði stuttligt og spennandi at síggja, hvussu løgnu verurnar í bókini tiggja sær á palli.

At leikurin gjørdist ein heldur misjøvn uppliving fyri undirritaðu, kom kanska av, at eg ikki kendi verurnar í Geyma frammanundan. Hinvegin, so haldi eg, at ein leikur altíð so ella so eigur at kunna standa einsmallur. Og tá sjálv søgan ikki kann tryggja tað, mugu aðrir ellibitar í rótasúpanina.

## Frálíkt samspæl

At summir bitar í leikinum eru heldur vatndeyvir, kunnu vit kanska bera yvir við. Serliga tí aðrir bitar eru so fullir av saft og kraft, at smakkurin av teimum kennist í langa tíð aftaná. Ikki minst tí samspælið millum tónleik og sjónleik í løtum er á einum støði, sum eg ongantíð fyrr havi sæð á palli í Føroyum. Til dømis er tað ein sonn fragd at síggja Hans Torgarð spæla leiklutin sum Klikkheys, samstundis sum hann leggur rødd til Brølapuna og um somu tíð má renna runt eftir tíðindum, sum hann pakkar í Slatritaskuna, til hann til endan missir Pippið. Um tað er frálíki tónleikurin hjá Kim Hansen, sum heldur lív í sjónleikinum hjá Hans Torgarð hesa løtuna ella øvut er ilt at siga. Og tað er væl besta prógvið um, at í framúr góðum sampæli megna staklutirnir at skapa ein heilt nýggjan heim.

## Forfjónaðir staklutir

Í øðrum førum tykjast staklutirnir heldur forfjónaðir. Til dømis er tað heldur ógreitt, hvørjar leiklutir verur sum Lellurin, Olmussudýrið, Viks og Svansibob skulu fylla. Her er leikurin merktur av, at eitt fitt hugskot ikki altíð ber meir enn bara seg sjálvt.

Eisini tykist tað heldur malplacerað, tá leikurin brádliga flytir seg yvir í okkurt slag av meta-leiki við at gera vart við seg sjálvan sum sjónleik. Sum tá Roksimalena byrjar at syngja ein sang úr Klintrimús, og so knappliga steðgar og rópar ”Halt kipp, skeivur leikur”. Ella tá Grenjisurran má spæla eitt brot umaftur, tí hon hevði miskilt raðfylgjuna í rørslunum. Gamaní eru hesi brotini stuttlig í sær sjálvum, men sum partur av heildini er ringt at fáa eyga á, hvør meiningin er.

## Dirvi til nýhugsan

Tá tað er sagt, havi eg sera stóra virðing fyri, at Tjóðpallurin hættar sær undir eitt so stórt, dýrt og øðrvísi projekt sum Í Geyma. Tað tryggasta hevði verið at tikið ein leik, sum 50 leikbólkar hava spælt fyrr, og har tú hevur vissu fyri, at bæði úrslitið og ummælini fara at vera fín. Í staðin hava tey satsað, tikið eina uppunaføroyska bók, gjørt hana til leik og borðreitt við ongum minni enn eini heimsfrumframførslu - í Føroyum.

Tjóðpallurin hevur langt síðani prógvað, at tey hava leikarar á sera professionellum støði. Við leikinum Í Geyma heva tey hartil víst, at tey eisini hava kreativitetin og dirvið til nýhugsan, sum skal til fyri at flyta føroyskan sjónleik inn í framtíðina - og har kanska entá eisini skapa okkara heilt egnu sjónleikatraditión.

### Í Geyma

**Eftir:** Dánial Hoydal
**Leikstjórn:** Ágústa Skúladóttir
**Tónleikur:** Kim Hansen
**Pallmynd:** Guðrún Öyahals
**Búnar:** Katrin Þorvaldsdóttir
**Ljós:** Àrni Baldvinsson
**Grímur:** Marjun Olsen
**Leikarar:**
**Barbara Christophersen:** Fjakkari, hin Rádni, Kánus, Lellurin, ein av Harkaliðnum
**Birita Mohr:** Fjakkari, Viks, Spyrjus, Jassurin
**Gunnvá Zachariasen:** Fjakkari, Roksimalena, ein av Harkaliðnum
**Gutti Winther:** Fjakkari, Hermus, Lúsungin, Klikkheys
**Hans Tórgarð:** Fjakkari, Tíðindafróði, Pippi, Klikkheys, Skálkur, Svansibob
**Petur Meinhard E. Andersen:** Fjakkari, Kúllur, Klikkheys, Lellurin
**Rakul Thomsen:** Fjakkari, Gellan, ein av Harkaliðnum
**Ria Tórgarð:** Fjakkari, Grenjisurran, Yvirs, ein av Harkaliðnum

**Tónleikarar:** Brandur Jacobsen, Kim Hansen, Magnus Johannessen
**Foto:** Martin Sirkovsky
**Leikskrá og plakatuppsetan:** Niels Arge Galan
**Seyming og búnagerð:** Katrin Bonde, Katrin Þorvaldsdóttir, Jacobina Djurhuus og Gisleyg Bonde
**Ljósfólk:** Símun Pauli Hansen
**Pallgerð:** Símun Pauli Hansen, David Geyti, Janus Kamban , Guðrún Øyahals, Nemus Nap. Djurhuus
**Rekvisittir:** Guðrún Øyahals